## íslendsk framsýning á Norðuratlantsbryggjuni

Fram til 27 juni verður ein øðrvísi framsýning at síggja á Bryggjuni í Keypmannahavn. Talan er um eitt íslandskt plátufelag, ið hevur havt bæði Bjork, Ham og The sugarcubes undir hond. Felagið eitur Smekkleysa, ið umsett til enskt merkir Bad Taste Ltd.

Hetta er eitt øðrvísi felag, ið veruliga hevur markerað seg á altjóða pallinum, bæði fyri fantastisku framleiðslurnar, men ikki minst fyri at ganga ímóti tí pena, nossliga og góða stílinum, sum hoyrir listaheiminum til. Tey hava gingið á odda fyri at gera Bad Taste, modernaðan, og tað við góðari eydnu.

Framsýningin á Bryggjuni vísir plancher, tónleikasjónbond og ymsik ting frá søgu felagsins. Høvi er at síggja alla søguna, heilt frá teirra krúpandi byrjan og til tann stjørnustatus, sum felagið hevur í dag.

Á listastevnuni sum verður í Føroyum í fyrst í august, fáa eisini føroyingar møguleika at síggja framsýningina, tí fyrireikararnir hava fingið hana hendaveg.

**eys**

## Búmerkjakapping

LFS, sum er Landsfelag Sløkkiliðsmanna, hevur skrivað út kapping um nýtt búmerki til felagið.

Búmerkið skal vera einfalt og nýtilgt til mong og ymisk endamál, t.d. brævpappír, heimasíðuna o.m.a. LFS skal helst verða partur av búmerkinum.

Støddin skal vera A4 og búmerkið skal í mesta lagið vera í trimum litum og á hvítari bakgrund, eins og tað skal vera egnað at prenta í svart/hvítum.Tað skal eisini kunna minkast í stødd til umleið 1,5 x 1,5 cm., uttan at missa síni sereyðkenni.

Tekningarnar skulu ikki vera signeraðar, men eitt eyðmerki skal setast aftanfyri á tekningini. Navn, bústaður og tlfnr. skal leggjast í ein brævbjálva, sum er hevur sama eyðmerki, sum tekningin.

Øll kunnu vera við í kappingini. Tríggjar virðislønir kunnu latast, 1. er á 5000 kr, 2. er á 2000 kr og triðja virðisløn er á 1000 kr. um dómsnevndin ikki heldur nakað uppskot vera nýtiligt, verður eingin virðisløn latin.

Uppskotini skulu vera Landsfelag Sløkkiliðsmanna í hendi innan 18 mai kl 12.

**eys**

## Amnesty fingið nýggja nevnd

Amnesty International Føroya Deild hevði aðalfund hóskvøldið 15 apríl.

Har var nýggj nevnd vald, og hon hevur skipað seg soleiðis:

Annika Sølvará, forkvinna, Áki Johansen, næstformaður, Erling Isholm, kassameistari, Jette Hoydal, nevndarlimur og Katarina Petersen, nevndarlimur. Tiltakslimir eru Hildur Paturson og Anna Maria Persson, sum eisini er skrivari felagsins.

**eys**

## Sangkórið Glymur við nýggjari fløgu

Mikudagin 28. apríl kemur nýggj fløga í handlarnar. Tað er sangkórið Glymur, ið við samstarvi við Tutl, letur eina fløgu av hondum. Á fløguni eru 12 sangir, harav 4 eru nýinnspældir. Annars eru upptøkur ymsa staðni frá, m.a. eru nakrar gamlar upptøkur frá 1991, okkurt er upptikið í Álandi og okkurt er frá 10 ára haldinum í Norðurlandahúsinum.

Fløgan verður útgivin í sambandi við, at kórið hevur 20 ára stovningardag. Sunleif Rasmussen stovnaði kórið í 1983. Í hesi 20 árini hevur kórið havt 7 kórleiðarar, tann sum stjórnar kórinum nú eitur Pauli Hansen.

20 ára hátíðarhaldið byrjaði 15. apríl, tá kórið fór til Hetlands at hava konsert í Lerwick. Hetta var ein konsert við bæði hetlendskum og føroyskum sangi. Áhugin fyri konsertini var so stórur, at fólk stóðu í langari bíðirøð at tryggja sær pláss. Glymur sang sostatt fyri fullum sali í Hetlandi.

Men føroyingar sleppa eisini at hoyra kórið. leygardagin 1. maj kl 16 verður konsert hildin í auluni í kommunuskúlanum í Havn. Har verður eisini møguleiki at ogna sær nýggju fløguna.

**eys**

# Áhugaverd myndaframsýning um bygdarsøguna í Hoyvík

**»Hoyvík í eina øld« kallast myndaframsýning, sum H71 stuðlar skipa fyri á Torginum í SMS hesa vikuna**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*



*Mynd tikin í 1929 av ungfólki í hylinum við Rock All – sum er ein steinur í Hoydalsá*

Søgan hjá Hoyvíksbygd er aldargomul. Nú er Hoyvík eitt av størstu nýggju bústaðarøkjunum í Føroyum, men fyri bert 200 árum síðan var bert ein býlingur í Hoyvík. Tað var býlingurin heimi á Garði, har ið bóndagarðurin var. Hesi valahús standa enn og eru nú umvæld og verða varðveitt sum fornminnissavn. Í 1802 kom uppsitari at sita í einum øðrum húsum heimi á Garði, tá ið helmingurin av festinum varð tikin til fútagarð.

Í 1830-árunum kom ein annar býlingur, uttan fyri Garðar, tá ið traðarmaður velti sær trøð her - Garðatrøðna. Nakað um somu tíð varð Hvítanes bygd. Hvítanes er tað, ið nevnt verður niðursetubygd. Í 1908 varð sanatoriið bygt í Niðastu Hoydølum. Fyrst Gamla Hús og síðan - í 1922 - Nýggja Hús. Í 1920-árunum yvirtók royndarstøðin jørðina, ið hoyrdi til festið hjá fútagarðinum. Tá vórðu nýggj hús bygd til støðina heimi á Garði. Hesum húsum húsast Føroya Fornminnissavn nú í.

Í 1975 flutti bóndagarðurin niðan á Vatnaskarðar, har ið stórt lendi varð velt upp úr nýggjum eitt nú fyri at fáa høgligari og meiri nýmótans jarðarbrúk. Har er garðurin enn.

Brot úr hesi áhugaverdu bygdarsøgu verða lýst við myndaframsýningini »Hoyvík í eina øld«, ið H 71-stuðlar skipa fyri í sambandi við at stórt tombola verður á torginum í SMS hósdagin, fríggjadagin og leygardagin.

Myndaframsýningin fevnir um nýggjar og gamlar myndir, og hon lýsir søguna hjá Hoyvík hesa seinastu øldina. Serliga er bygdin vaksin og broytt ótrúliga nógv seinastu 30 árini, eftir at farið varð undir at útstykkja hagan til grundstykki. - Hóast okkurt er, sum ikki er komið við, so er framsýningin sera viðfevnd og lýsir bygdina rættiliga væl. Framsýningin varð sýnd fram í 1999, og av teirri orsøk, at áhugin fyri henni var sera stórur, varð avgjørt at seta hana upp aftur.

H71-stuðlar er felag, sum hjálpir til við ungdómsarbeiðinum hjá H71. Hóast felagið hevur nógvar trúgvar limir, so krevst nógvur peningur til at skipa ungdómsarbeiðið, ikki minst nú tá ið møguleikarnir eru vorðnir nógv fleiri, eftir at nýggj ítróttahøll varð bygd - Hoyvíkshøllin - og eisini setur tað stór krøv, at talið á børnum og ungfólki, sum búgva í Hoyvík í dag, er stórt og alsamt vaksandi. Hetta er 5. ferð, at H71-stuðlar hava havt tombola í SMS, og áhugin fyri at lata vinningar hevur eins og hini árini verið góður. Tiltakið hevur eisini hvørja ferð eydnast væl og hevur verið eitt gott ískoyti til raksturin í felagnum.

Vinningarnir hesa ferð eru eisini góðir, eitt nú bæði veðratjógv, borimaskinur, bøkur, gávukort umframt nógvir aðrir góðir vinningar av ymsum slag.

# Nýggj føroysk fløga

Í næstum fer Knút Háberg Eysturstein at geva út eina sologløgu. Knút hevur spælt í bólkinum Gestir, sum vann Prix Føroyar kappingina. Hann hevur áður eisini spælt við Marygold og Mary's baby.

Fløguna hevur Knút arbeitt við og innspælt saman við vinmanninum Allani Tausen. Knút hevur tikið sær av sangi, gittarleiki og tangentum, meðan Allan hevur spælt bass og tikið sær av forritan. 10 løg verða á fløguni, og tey hevur Knút skrivað fimm tey seinastu árini.

Tónleikurin fer at fevna um sveimandi rock, singer/songwriter, atmosferiskan pop, post rock o.m.a.

Hildið verður, at teimum, ið dáma gestir eisini fara at dáma hesa fløguna, hóast hon verður nakað øðrvísi enn tónleikurin hjá Gestir er.

Hans Poulsen skal miksa fløguna, sum kemur út í summar.

**eys**



*Knút Háberg Eysturstein, kendur úr bólkinum Gestir, letur í summar nýggja fløgu av hondum*

# Máf skeið í pallmynd, ljóssetan og sjónleiki

Frá fríggjadegnum 30. apríl til sunnudagin 2. mai verður eitt skeið hildið á Meiarínum. Tað verða tveir av dugnaligastu listarmonnunum innan ljós og scenografi í Íslandi, sum koma hendaveg at undirvísa. Snorri Freyr Hilmarsson er senograftur og Árni Baldvinsson er ljósmaður. Egi Dam úr leikfelagnum Grímu, fer at undirvísa í sjónleiki.

Øll, ið eru áhugað kunnu koma; bæði roynd og óroynd.

**eys**



*Í næstum verður skeið fyri øll sjónleikaáhugað á Meiarínum*

*mynd: máf*



# Kirkjulig útbýgging í Kvívík



Meira pláss skal verða til ymisk tiltøk, tá Kvívíkar kirkja hevur okkurt tiltakið. Tískil eru tey í Kvívík farin undir útbyggingar, soleiðis at meira pláss verður til konfirmantar, konsertir, og onnur tílík stór tiltøk.

Marjun Bæk, prestur í Kvívík, sigur, at fólk vænta sær onnur ting av kirkjuni, enn tey gjørdu fyrr.

– Eg haldi, at tað eru onnur krøv í tíðini, sum vit royna at ganga á møti, so hvørt tey koma, sigur Marjun Bæk, prestur.

Sum skilst er útbyggingin eitt gamalt ynski, sum fólk við tilknýti til kirkjuna hava havt.

– Tað er sjálvandi ein vón um, at hetta fer at økja um kirkjuliga virksemið. Men nú fáa vit so betri umstøður, og so fáa vit at síggja, sigur Marjun Bæk, sum hevur verið prestur í Kvívík í eini 18 árini

**hkm**

# Sambýlið á Eiði fær fleiri búpláss



Eiðis kommuna er í holt við gera fimm nýggj búplass í Korndalsbýlinum, sum er eldrasambýlið á Eiði. Korndalsbýlið varð bygt á sumri 1999, men partar av niðaru hæddini hava ikki verið í brúk. Tískil er ætlanin nú, at fimm nýggj búpláss skulu standa liðug skjótt, og meiningin er at taka tey í nýtslu einaferð í heyst.

– Eg vænti, at hesi fimm nýggju búplássini koma at nøkta tørvin í nógv ár framyvir, sigur Anfinnur Kruse, sum er limur í kommunustýrinum á Eiði.

Nýggju búplássini liggja um 200 fermetrar, og bað og wc er í øllum rúmunum. Nýggja íløgan kemur at kosta eina góða millión, og tað er kommunan, sum fíggjar alt.

Eiðis kommuna valdi ikki at fara upp í felagskommununa, sum er í Sundalagnum, men hóast tað tykist kommuna vera sera væl fyri fíggjarliga. Nýliga varð nýggj ítróttarhøll tikin í nýtslu, og fimtan nýggjar útstykkingar eru á veg. Umframt hesar íløgur er eisini ein barnagarður skotin út í kortið. Allar íløgurnar eru goldnar við kontantum peningi, og Eiðis kommuna hevur onga skuld.

**el**


Goymslufólk
Til Havnar Timburhandil

Vit sóknast eftir einum fólki til goymslu okkara í Tórshavn.
Starvið ynskist sett skjótast gjørligt.

Starvið fevnir um vanligt avgreiðsluarbeiði á goymslu okkara í Tórshavn.

Vit vænta at tú:

- ert nærløgd/nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarvað við onnur

Løn sambært sáttmála við arbeiðarafelagini í Havn.

Umsóknin skal sendast til:

Timburhandilin
Heykavegur 4, Box 3038
FO-110 Tórshavn

Att: Jan á Argjum

*Hevur tú spurningar kanst tú venda tær til okkum á tlf. 31 12 50*

Timburhandilin • 3112 50

TIMBUR HT HANDILIN

Tórshavn: Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
Sandur: Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • Kambsdalur: Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41
www.timburhandilin.fo



Til lukku,
Havnar Fimleikafelag!



- bestar í Ríkinum!

Kaupthing ynskir gentunum hjá Havnar Fimleikafelag, sum vunnu DM-kappingina í rútmiskum fimleiki, hjartaliga tillukku.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag